## Atlantsflog nýggja ferðaætlan



EIRIKUR LINDENSKOV

Sunnudagin kom í gildi nýggja ferðaætlanin hjá Atlantsflog, og er hon galdandi til 29. oktober.

Í hesi ferðaætlan verður Aberdeen-rutan tikin uppaftur. Flogið verður til Aberdeen hóskvøld og sunnukvøld og úr Aberdeen til Føroya fríggjamorgun og mánamorgun. Farið verður úr Vágum hóskvøld og sunnukvøld klokkan $17^{30}$ til Aberdeen og víðari til Keypmannahavnar, har flogfarið verður standandi til morgunin eftir, tá ið tað flýgur úr Keypmannahavn klokkan $7^{45}$ um Aberdeen til Føroya.

Eisini er sambandið til Reykjavíkar frá í gjár økt til tríggjar ferðir um vikuna. Tá verður flogið mánadag, mikudag og fríggjadag.

## Heilsufrøðiliga avtalan við ES

*Vinnumálastýrið bjóðaði týsdagin í farnu viku vinnuni til kunnandi fund um heilsufrøðiligu avtaluna við ES. Greitt varð í stuttum frá gongdini í samráðingunum. Tilgongdin byrjaði í 1996, tá føroysk vinna vísti á trupulleikar, sum vinnan hevði av ikki at hava eina heilsufrøðiliga avtalu við ES, skrivar Vinnuhúsið*

Í tíðindaskrivi frá Vinnuhúsinum, verður greitt frá, at Løgmansskrivstovan samskipar arbeiði við at fáa heilsufrøðiligu avtaluna við ES. Kate Sanderson er samráðingarleiðari fyri Føroyar. Soleiðis sum støðan er í løtuni, er tað Vinnumálastýrið, ið skal gera neyðuga lóggávuarbeiðið áðrenn 1. feb. 2001, tá samstarvið millum Føroyar og ES fær gildið.

Frumskjalið varð undirskrivað av báðum pørtum í fjørð og kom í gildið 1. jan. 2000. Í frumskjalinum binda Føroyar seg at halda ES-reglur og at hava eftirlit við: djóraheilsu, matvørum og ílatingarevnum í matvørum

Endamálið við hesum er, at føroysk vinna í framtíðini skal kunna útflyta vørur uttan at verða støðgað við markið inn í ES. Føroyar skal tó ikki innføra allar ES – reglugerðir nú t.d. skulu reglur fyri landbúnaðarvørur ikki setast í verk í Føroyum. Í fyrsta umfari verður tillagingin avmarkað til reglur viðvíkjandi fiski- og alivinnuni. Í samráðingunum í seinastu viku bant føroyska samráðingarnevndin seg til, at Føroyar skal hava neyðuga lógarverkið klárt 1.feb. 2001. Áðrenn tað tíð skal málið fyri í tinginum.

### Partur av ES

Á fiski- og alivinnuøkinum eru Føroyar frá 1. feb. 2001 ein partur av ES og undirløgd allari ES- lóggávu á økinum í framtíðini. Hetta er galdandi fyri framleiðslu av fiski, fóðri og øllum akvakultur vørum.

Afturfyri at innføra ES lóggávuna verður støðan at: marknaeftirlitið í ES fellur burtur og til ber at senda vørur beinleiðis til einhvønn móttakara í ES og heilsuváttanir fella burtur

Afturfyri skulu Føroyar syrgja fyri: Livandi dýr og vøra hava frítt at fara til Føroya (tað ber til grundað á vísindaligar kanningar at seta restriktiónir fyri hvat verður innflutt til Føroyar av ymiskum djórum). Vit ikki kunnu útflyta annað enn tað, sum er undirlagt ES-lóggávu. Stovnseta eina Marknaðeftirlitsstøð, sum er undirløgd FVO í Dublin ( 3. lands fiskur t.d. frystur russarafiskur skal gjøgnum Marknaeftirlitsstøðina, áðrenn hann verður virkaður í Føroyum. Fiskurin skal verða frá góðkendum skipum). Eftirlitsgjøld bæði í vanliga vørueftirlitinum og ísamband við innflutning frá 3. londum.

### Løggilding

Løggilding av uppboðssølum, frostgoymslum, ísvirkjumv.m.. Løggilding av fiskamjølsverksmiðjum: Sjúkuprogram í alifiski. Yvirvøku av heilivági í alifiski. Yvirvøku av giftevnum í skjeljum. Góðsku- og støddarflokking av feskum fiski, tá landað verður, sambært ES-reglum.

Fyri tað almenna Føroyar merkir tað at: íløgur mugu gerast í eina marknaeftirlitsstøð, íløgur mugu gerast í starvsstovuøki (fiskasjúkur, heilivágur o.a.), størri orka brúkast til løggilding og eftirlit og størri orka í sjúkufyribyrging og eftirlit, skrivar Vinnuhúsið.


# Ársaðalfundur

**Boðað verður til ársaðalfundar í S/F TRYGGINGARFELAGNUM FØROYAR**

**fríggjadagin 14. apríl 2000 kl 17.00**

**á Hotel Føroyum, Tórshavn, við hesi dagsskrá:**

1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í 1999
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar og hvussu avlop sambært roknskapinum verður nýtt, sí § 29, stk. 3, í viðtøkum felagsins
3. Val av grannskoðarum
4. Møgulig uppskot, ið nevndin, stjórnin ella umboðsfólk ynskja at viðgera
5. Ymiskt

Grannskoðaði árskoknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á skrivstovu felagsins á Kongabrúnni.

**Beint aftaná ársaðalfundin verður**

## Eykaaðalfundur

**á sama stað við hesi dagsskrá:**

1. Val av 3 nevndarlimum, sí § 22, stk. 2 og § 31, stk. 4 í viðtøkum felagsins.

Allir felagsins tryggingartakarar eru limir í felagnum og hava rætt til at møta á aðalfundunum, men skulu í seinasta lagi 5 dagar frammanundan skrivliga boða høvuðsskrivstovu felagsins frá luttøku.

**Tórshavn, tann 27. mars 2000**

**Nevndin**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Kongabrúgvin
P.O.Box 329
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel+298 345600
Fax+298 345601
tf@trygging.fo
www.trygging.fo

SANSIR - TEL 355 355


## Virkin listamaður í Smiðjuni

*Í gjár lat virkni listamaðurin Sofus Poulsen upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

DAGFINN OLSEN

Sofus Poulsen er virkin listamaður.

Hann er dúgligur við penslinum. Hann hevur í seinastuni havt fleiri framsýningar.

Hann fevnir víða í málningalist síni, men eittnú landslagsmyndir eru millum myndevnini.

Av tí, ið Sofus nýliga hevur havt á framsýning sæst, at sum mangur annar, hevur eisini Sofus leitað sær íblástur í Saksun, eins og aðrastaðni í Føroyum. Eisini Havnin gevur íblástur og sæst hetta aftur í myndunum hjá Sofusi. Hann hevur starvsstovu Úti á Reyni og gamli býarparturin og vágirnar eru millum myndevnini.

Í gjár lat Sofus Poulsen upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Sýningin er opin til 2. apríl. Opið er hvønn dag frá 16 - 20.



*Sofus Poulsen lat í gjár upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Sýningin er opin til 2. apríl. Mynd: Jens Kristian Vang*



# Enn tvær heiðurslønir til Bye Bye Blue Bird



*Bye Bye Blue Bird hjá Katrini Ottarsdóttir fekk um vikuskiftið tvær heiðurslønir á 13. Norðurlendsku Filmsstevnuni í Ruen í Fraklandi.*

*Filmurin Bye Bye Blue Bird fekk tvær heiðurslønir á Norðurlendsku Fimsstevnuni í Fraklandi. Hetta er triðju og fjórðu ferð, filmurin fær heiðursløn. Filmurin er millum teir mest eftirspurdu hjá Det Danske Filminstitut*

DAGFINN OLSEN

Leygardagin fekk filmurin Bye Bye Blue Bird hjá Katrini Ottarsdóttir tvær heiðurslønir á 13. Norðurlendsku Filmsstevnuni í Ruen í Fraklandi.

Talan er um Áskoðaraheiðurslønina, har áskoðararnir atkvøða um, hvønn film teimum dámar best, og Ungdómsfilmsheiðurslønina. Í dómsnevndini fyri hesa heiðursløn sita 9 ungfólk.

### Ikki fyrstu ferð

Filmurin hjá Katrini hevur verið heiðraður áður og hetta eru triðja og fjórða ferðin, at hann fær heiðursløn.

Áður hevur filmurin fingið heiðursløn á filmsstevnum í Lübeck í Týsklandi og Rotterdam í Hollandi. Eisini hevur hann fingið góða ummrøðu á filmsstevnu í Mannheim-Heidelberg í Týsklandi.

### Nógv eftirspurdur

Katrin Ottarsdóttir hevur verið í Ruen og tikið ímóti heiðurslønunum og hon steðgar tveir dagar í Amsterdam á heimvegnum í samband við, at filmurin skal á ferð til sýningarhøli har í landinum.

Í hesum døgum verður Bye Bye Blue Bird eisini sýndur í París, har Det Danske Filminstitut skipar fyri sýningum av nýggjum donskum filmum.

Í juli skal filmurin á filmsstevnu í Karlovy Valy í Tjekkia og óivað skal filmurin aðrastaðni eisini.

Á Det Danske Filminstitut, ið stendur fyri at senda filmin til stevnur, verður sagt, at Bye Bye Blue Bird er filmurin, ið flest stevnur spyrja eftir. Fyri at nøkta tørvin, hava tey gjørt eitt eyka eintak av filminum.

### Út í heim

Ætlanir eru eisini um at fáa filmin í sýningarhøli úti í heimi.

Arbeitt verður við hesum. Samráðingar eru í gongd við filmskeyparar í Hollandi, Italia, Japan og USA.

Slíkt tekur drúgva tíð og enn er ov tíðliga at siga, hvat kemur burturúr hesum samráðingum.

Til ber at kaga inn á heimasíðuna www.byebyebluebird.dk



*Katrin Ottarsdóttir. Bye Bye Blue Bird fekk um vikuskiftið enn tvær heiðurslønir og á Det Danske Filminstitut, ið stendur fyri at senda filmin til stevnur, verður sagt, at Bye Bye Blue Bird er filmurin, ið flest stevnur spyrja eftir*





# Føroya Banki søkir eftir bankanæmingum

Ert tú ein av teimum, ið torir at taka ímóti nýggjum avbjóðingum? So er hetta kanska nakað fyri teg, tí Føroya Banki søkir eftir fólki at byrja sum bankanæmingar.

Sum næmingur í Føroya Banka fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving, sum gevur kunnleika til øll peningalig viðurskifti, bæði verkliga og ástøðiliga. Eisini fært tú góðar møguleikar at útbúgva teg víðari tann vegin innan fíggjarheimin, ið tú hevur áhuga fyri.

Á henda hátt kanst tú menna teg, samstundis sum tú fært nýggjar avbjóðingar. Og tú verður við til at gera Føroya Banka enn betri.

**Er hetta nakað fyri teg?**
Ert tú virkin, hevur áhuga at starvast innan bankayrkið og hevur HH-, students, HF- ella líknandi prógv - ja, so verður tú kanska ein av komandi næmingunum í Føroya Banka.

Sum næmingur kemur tú at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum arbeiðsfelagum og viðskiftafólkum bankans.

At arbeiða í Føroya Banka snýr seg ikki bert um fíggjarviðurskifti, men eisini um at fáast við fólk, at veita ráðgeving og at bjóða tænastur fram. Tí eru tínir menniskjansligu og fakligu eginleikar týdningarmiklir.

**Send tína umsókn í dag...**
Umsóknin saman við avritum av prógvum og møguligum ummæli verður at senda:

*P/F Føroya Banka*
*Starvsfólkadeildin*
*Postboks 3048*
*FO-110 Tórshavn*

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 3. apríl 2000.

FØROYA BANKI

petur & petur • 320870